

# Avbjóðingar fyri føroyska fiskaframleiðslu

**Seinnapartin fríggjadagin skipaði Føroya Banki fyri áhugaverdari ráðstevnu á Hotel Føroyum undir høvuðsheitinum: "Avbjóðingar fyri føroyska fiskaframleiðslu". Ráðstevnan setti sjóneykuna á lønsemistrupulleikarnar hjá okkara fiskavirkjum og viðgjørdi spurningin, hvørjar møguleikar vinnan hevur at menna kappingarevnini mótvegis teimum londum, vit kappast við**

FB-RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seks framløgur vóru á fundinum, sum forstjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, stjórnaði við hepnari hond.

Tað var Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, sum legði fyri. Hann tók saman um gongdina hjá fiskavirkjunum seinastu árini, men noyddist at ásanna, at virkini – frá at hava gingið væl í nøkur ár – nú eru í einum aldudali og samanlagt fara at geva eitt hall í ár, sum fer at tátta í einar 30 miljónir krónur. Hann reisti spurningin, um fiskivinnan í Føroyum er á veg inn í eina kreppu, og hvat vit kunnu gera fyri at byrgja uppfyri, at virkir og skip fáa vent gongdini.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, tosaði um neyðugar broytingar í politisku kørmunum og vísti á, at hann júst sama morgun, sum ráðstevnan varð hildin, hevði hann lagt fram ein sonevndan "fiskapakka" fyri landsstýrismenninar og samgongutinglimirnar. Í hesum pakka er uppskot um broytingar, sum eitt nú skulu avmarka møguleikarnar hjá skipum at avreiða uttanlands, og somuleiðis er uppskot sum skal gera tað møguligt hjá útlendingum at bjóða uppá fisk, sum verður seldur á uppboðssølu í Føroyum. Ein partur av upplegginum hjá landsstýrismanninum snýr seg um skiljing av fiskinum umborð.

Egil Olsen, sum er formaður í ráfiskakeyparafelagnum, setti spurningin, um verandi rávøruatgongd er nøktandi fyri fiskavirkini. Hann viðgjørdi spurningin, um tað kanska er ein fyritreyt fyri føroyskari fiskaframleiðslu á landi, at virkini fáa støðugari atgongd til rávøruna – og um hetta krevur eitt økt samstarv millum skip og virkir. Hann tosaði um lítla virksemi, sum er á fiskavirkjunum og segði, at nú gongdin er versnandi, serliga hjá frysti-virkjunum, er vandi fyri, at nøkur virkir ikki fara at hóra undan.

Formaðurin í ráfiskaseljarafelagnum, Árni Joensen, tosaði um, hvørjar avleiðingar tað kann fáa, um skipini verða noydd at bjóða allan fiskin út í Føroyum – og soleiðis verða skerd frá møguleikunum at avreiða uttanlands. Men upp á spurningin, um veiðiliðið skal tryggja grundarlagið undir framleiðsluni á landi, svaraði Árni: Ja, sjálvsagt. Í sínum innleggi greiddi hann frá sjónarmiðjunum hjá ráfiskaseljarunum og helt fyri, at ráfiskaseljarar mugu hava ein møguleika at fara uttanlands við fiskinum, áðrenn hann endar í køstinum hjá Havsbrún, sum hann tók til.

Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking, viðgjørdi spurningin, hvussu okkara flakavinna kann halda seg kappingarføra. Hann tosaði í breiðari merking um týdningin av aling av ymiskum fiskasløgum úti í heimi, og hvørjir kappingarneytarnir hjá okkum eru. Hann reisti spurningin, um lønarlagið hjá okkum er ein trupulleiki og nevndi møguleikan, um framleiðsla av feskum úrdráttum kanska er ein vegur fram. Meinhard viðgjørdi eisini spurningin, um framleiðsluliðið eigur at knýta tættari sambond við marknaðin og rávøruliðið.

Seinastu framløguna í røðini hevði íslendingurin, Agnar Fríðriksson, sum er stjóri á Coldwater í Grimsby. Hann tók saman um tær royndir, sum íslendingar hava við framleiðslu í – og í kapping við - láglønarlond. Agnar hevði eisini sítt boð uppá, hvørjar framleiðslustrategiir koma at standa seg best komandi árini, og hann viðgjørdi eisini spurningin, um bygnaðurin í íslendska fiskivinnuídnaðinum hevur havt týdning fyri lønsemið.

Eftir framløgurnar, var pallborðsorðaskifti, sum í størstan mun snúði seg um skiljing av fiski umborð á skipunum, nú landsstýrið ætlar at loyva útlendingum framat fiskinum, sum í framtíðini verður boðin út í Føroyum.

Sosialurin fer at venda aftur til áhugaverdu framløgurnar í hesi vikuni, men fer í hesum blaðnum at endurgeva ein part av tí kjaki og teimum spurningum, sum vóru frammi undir orðaskiftinum.



# Ymiskar meiningar um skiljing av fiski

**Jóhannes Olsen, stjóri á P/F Snodd, heldur ikki, at vit eiga at seta lóg ella kunngerðir í verk sum krevja, at fiskurin verður skildur umborð. - Eg haldi, at teir, sum vilja gjalda fyri tað, skulu fáa skildan fisk, segði hann**

FB-RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Forstjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, var fundarstjóri á áhugaverdu og gevandi ráðstevnuni, sum bankin skipaði fyri seinasta fríggjadag. Forstjórin leiddi ráðstevnuna við hepnari hond*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Undir orðaskiftinum á ráðstevnuni, sum Føroya Banki skipaði fyri fríggjadagin, snúði kjakið seg serliga um skiljing av fiski.

Olaf Olsen var fyrstur at taka orðið. Hann legði fyri við at spyrja landsstýrismannin, Bjørn Kalsø, hvat landsstýrið meinar við, tá ið hann tosar um lóg um almenna uppboðssølu.

Landsstýrismaðurin svaraði, at í verandi lóg eitur tað "lóg um almenna uppboðssølu", og tí hevði hann málborið seg soleiðis.

Jákup Sólstein, formaður í reiðarafelagnum, segði, at felagið fer ongantíð at góðtaka, at støddarskiljing verður eitt lógarkrav. Hann segði seg hava roynt at sett seg í samband við Fiskimálastýrið um hesi viðurskifti, men sum hann tók til, at "har eru tey so ofta á skeiði".

- Hevur landsstýrið ikki skilt boðskapin hjá felagnum, kunnu tey fáa hann inn við "skeið", segði hann skemtiliga.

Jákup helt ikki, at tað fer at geva skipum og manningum nakað eyka í prísi, antin fiskurin úr eini vanligari ísfiskalast verður skildur ella ikki.

Anfinn Olsen, reiðari, tók undir við formanninum í reiðarafelagnum.

Hann segði, at tað, sum seljarin vil, er at fáa besta prís fyri fiskin og teir, sum keypa og selja eitt nú hýsu av landinum, ynskja ikki, at fiskurin er skildur umborð.

- Skal tað vera eitt krav, at fiskurin verður skildur, áðrenn hann verður seldur, kann hann skiljast inni á gólvinum.

Anfinn segði, at teir, sum keypa fiskin og selja hann feskan av landinum, vilja hava hann í somu kassum, sum hann er í, tá ið hann kemur upp úr skipunum.

Egil Olsen, formaður í ráfiskakeyparafelagnum, er heitur talsmaður fyri, at fiskurin verður skildur umborð.

- Eg og Jákup Sólstein verða ongantíð samdir um henda spurning.

Egil nevndi, hvat tað hevur merkt fyri línuskipið, Grunning, at teir fóru undir at støddarskilja og merkja fiskakassarnar.

- Verður fiskurin skildur umborð, verður minni handfaring á landi, og vit fáa eina betri góðsku, segði hann og helt fyri, at vit eiga at taka hesa avbjóðing á okkum.

Hann segði, at útlendingar eru vanir við at keypa skildan – og ikki óskildan - fisk.

Egil Olsen var tó samdur við teimum sum siga, at skiljing umborð, sjálvsagt eigur at geva ein betri fiskaprís.

Bjørn Kalsø helt, at Jákup Sólstein meldar hart út.

Hann segði, at seinasta skeiðið, tey í fiskimálaráðnum høvdu verið á, var nevniliga í støddarskiljing.

Bjørn helt tað vera náttúrligt, at Jákup og Anfinn eru ivingarsamir um skiljing umborð, tí hetta gevur meira arbeiði umborð.

Landsstýrismaðurin var ikki so avgjørdur um, hvørt skiljing umborð eigur at ásetast við lóg ella kunngerðum.

- Eg vænti, at hetta fer at koma av sær sjálvum, tá ið útlendingar sleppa fram at føroyska fiskamarknaðinum, tí uttan skiljing verða skipini avmarkaði í sølu av fiskinum.

Bjørn helt tað eisini hava týdning, at føroysk virkir kunnu bjóða uppá tær nøgdir av fiski, sum tey vilja, og í hesum sambandi vísti hann á, at bæði stødd og aldur á fiski kunnu hava týdning fyri prísin, sum virkini vilja gjalda.

- Tað, sum vit arbeiða við í landsstýrinum, er ikki liðugt enn, og enn hevur vinnan ikki havt høvi at siga sína hugsan.

Landsstýrismaðurin helt tað vera umráðandi, at øll hesi viðurskifti fáa ta umrøðu, tey hava uppiborið.

Jørgen Niclasen, løgtingsmaður og fyrrverandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum, helt fyri, at eru trupulleikar í vinnuni á landi, nyttar ikki at flyta hesar út á sjógv.

Hann helt eisini, at almenni parturin í fiskavirkisvinnuni átti at verið privatiseraður aftur.

- Eg havi ongan hoyrt nevnt hetta á fundinum, segði hann.

Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking, segði, at tey hava mælt til, at selt verður úr felagnum, um góð boð eru, men hann legði dent á, at eftir hansara tykki skal hetta ikki verða til "vinir og kenningar", sum hann tók til.

Árni Joensen, formaður í ráfiskaseljarafelagnum, segði seg taka undir við Anfinni Olsen um skiljing.

Hann helt tað verða eitt stig aftureftir at skilja fiskin umborð, tí hetta verður ein "niðurflokkin" av fiski, sum hann segði.

Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, spurdi landsstýrismannin, um landsstýrið ætlar, at allur fiskur skal skiljast umborð - ella bara tann parturin, sum fer til ES.

Bjørn vísti á, at í uppskotinum hjá landsstýrinum, er talan um at støddarskilja allan fisk.

Egil Olsen helt, at einasti møguleikin at fáa meira fyri fiskin, er at støddarskilja.

- Verður fiskurin ikki støddarskildur, trúgvi eg ikki, at kappingin um fiskin verður nóg stór.

Jákup Sólstein helt tað vera í fínasta lagi, um skiljing verður frívillug.

Um umrøðuna av, hvørt skip og virkir aftur skulu tvinnast meira saman, helt formaðurin í reiðarafelagnum, at hetta bert kann føra til ein uppaftur lægri avreiðingarprís.

- Hesum eru vit hart ímóti, segði hann.

Páll Gregersen, stjóri á Fiskavirkinum í Gøtu, tók undir við, at fiskurin verður støddarskildur umborð.

- Eg haldi, at hetta er ein sjálvfylgja.

Hann vísti á, at øll virkir í Føroyum, sum selja feskan fisk, støddarskilja.

- Tey smáu virkini, vit hava, mugu kunnu keypa fisk, sum er støddarskildur, segði hann.

Anfinn Olsen segði, at ein stórur partur av fiskinum verður støddarskildur, áðrenn hann verður seldur.

- Tað eru nakrar hýsur, sum ikki verða skildar, tí her fáa vit meira fyri fiskin við, at hann ikki verður skildur.

Meinhard Jacobsen segði, at allur upsin, sum Føroya Fiskavirking keypir, er støddarskildur.

Hanus Hansen, reiðari hjá JFK-Troli og stjóri á Kósini, helt ikki, at tað kann vera ein so stórur trupulleiki at skilja fisk í einar 10 støddir, tí umborð á Skálabergi verður fiskurin skildur í 70 støddir, sum hann tók til, hóast hetta ikki rættiliga kann samanberast.

Olaf Olsen segði, at tú fært ikki manningina at skilja fiskin umborð, so leingi teir einki fáa fyri tað.

Hann spurdi, hvussu tað ber til, at manningarnar umborð á íslendskum skipum góðtaka, at fiskurin verður skildur umborð, tá ið tølini vísa, at teir ikki fáa meira fyri fiskin kortini.

Hann vísti eisini á, at skip, sum eru knýtt at virkjum í Íslandi, í miðal fáa minni fyri fiskin enn tey, sum eru "leys".

Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, segði, at í Íslandi hava ikki færri enn trý verkføll verið í samband við hesi viðurskifti, har fiskimenn eru ónøgdir við fiskaprísirnar.

Hann segði, at ein partur teirri "succes", sum føroyska fiskivinnan hevur upplivað fram til fyri 2-3 árum síðan, eitt nú botnar í, at skipini vórðu loyst frá virkjunum.

Árni Joensen segði, at vil keyparin rinda meira fyri skildan fisk, kann hann taka undir við, at fiskurin verður skildur umborð, men hesum er als eingin trygd fyri – og í løtuni er einki, sum bendir á, at hetta er so.

Hendrik Old, løgtingsmaður, helt ikki, at tað skuldi verið so trupult at skilt línufisk, tá ið ein og ein fiskur kemur um lúnningina í senn.

- Hvør skal keypa eina stóra last í Føroyum, har fiskurin ikki er skildur, spurdi hann.

Jákup Sólstein segði, at fiskurin í ávísum førum kann skiljast umborð, men hann er ímóti, at hetta skal gerast við lóg ella kunngerðum.

Kjartan Joensen, løgtingsmaður, sum eisini rekur fiskavirki í Leirvík, segði, at trupulleikin er ikki, at tey ikki fáa fatur á rávøru.

- Vit fáa so nógva rávøru, sum vit vilja, men vit hava ongan, sum dugir at selja lidnu vøruna.

Hann segði, at so hvørt, sum vit hava fingið fleiri sølufeløg í Føroyum, er prísurin á lidnu vøruni bara vorðin minni.

Jóhannes Olsen, stjóri á P/F Snodd, helt ikki, at vit eiga at seta lóg ella kunngerðir í verk sum krevja, at fiskurin verður skildur umborð.

- Eg haldi, at teir, sum vilja gjalda fyri tað, skulu fáa skildan fisk, segði hann.



*Á ráðstevnuni boðaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, frá ætlaðum broytingum í lógini um uppboðssølu. Broytingarnar koma at merkja, at útlendskir fiskakeyparar fáa atgongd til fisk, sum verður landaður í Føroyum og seldur á uppboðssølu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Umboð fyri politisku skipanina í Føroyum vóru eisini við á ráðstevnuni, sum Føroya Banki skipaði fyri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*